


*Tekur ein verulig oljuvinna seg upp í Føroyum, fer tað at fáa stóra ávirkan á Tórshavnar Kommunu. Umisitingin hjá kommununi skal nú útgreina, hvørji krøv, oljuvinnan fer at seta til høvuðsstaðin og, hvørja ávirkan hon annars fer at fáa. Minnilutin í Býráðnum heldur, at býráðssamongan tekur málið í alt ov lítlum álvara*

# Tórshavnar Býráð vil ikki takast á bóli

**Býráðið hevur samtykt at fáa greiði á, hvørji árin ein komandi oljuvinna fer at fáa á høvuðsstaðin**

OLJUÁRIN
*Áki Bertholdsen*

Tórshavnar Býráð ætlar ikki verða tikið á bóli, tá ið oljan kemur og Havnin eisini verður oljuhøvuðsstaður.

Á býráðsfundi seinasta hósdag samtykti Býráðið at nú skuldi greiða fáast á, hvørja ávirkan ein komandi oljuvinna fer at fáa á lívið og viðurskiftini í Tórshavnar Kommuni.

Tað er umsitingin hjá býráðnum sum skal gera hetta arbeiði, men hon fær heimild til at taka sær serkøna hjálp.

Fyri summarfrítína næsta ár skal umsitingin verða liðug og geva Býráðnum eina frágreiðing um tey krøv, sum oljunnan fer at seta høvuðsstaðnum og um, hvørji árin oljunnan fer at hava á býin.

Tað var Jógvan Arge, býráðslimur, sum longu í summar legði uppskot fyri Býráðið um at seta hesar kanningar í verk.

Men tað, sum nú er samtykt, er bara ein viðfáningur av tí, sum hesin býráðslimurin úr minnilutanum legði upp til, tí hansara uppskot var nógv víðgongdari

Tað, Jógvan Arge skeyt upp, var, at Býráðið samtykti at seta ein stýringarbólk við 3-5 politikarum. Hesin stýrisbólkur skuldi so gera ein arbeiðssetning fyri tær kanningar, sum skuldi gerast av tí tørvi, sum oljuvinnan fer at fáa í Tórshavnar kommunu og tí árini, sum kann fáa á Tórshavnar Kommunu.

Harumframt skeyt hann upp, at seta eitt serkønt fólk, sum burturav skuldi standa fyri tí ítøkiliga arbeiðnum.

Samstundis skuldu setast arbeiðsbólkar av embætisfólkum og serkønum at viðgera tey ymsu málsøkini, eitt nú mentan, bústaðir, býarætlan, býarlív, havnaviðurskifti, ansingarstovnar, skúlar o.s.fr.



*Jógvan Arge helt málið um, hvussu oljuvinnan fer at ávirka høvuðsstaðin vera so týdningarmikið, at hann kallaði tað kanska størsta mál, Tórshavnar Býráð nakrantíð hevði viðgjørt í allari hundrað ára gomlu søgu tess*

## Savna vitanina

Tað var nógv kjak í býrðanum um málið, tá ið tað var til viðgerðar.

Jógvan Arge helt hetta málið vera so týdningarmikið, at hann kallaði tað kanska størsta mál, Tórshavnar Býráð nakrantíð hevði viðgjørt í allari hundrað ára gomlu søgu tess.

Men hesum var meirilutin í Býráðnum als ikki samdur um. Jan Christiansen, borgarstjóri, nevndi uppskotið eitt politiskt flopp og hann helt at tað var óneyðugt at gera so nógv av.

Hann vísti á, at Býráðið hevði longu bæði Aberdeen- og Stavangurnevnd, sum, saman við umsitingini, longu hevði sett seg væl og virðiliga inn í, hvønn tørv oljuvinnan fór at seta og, hvørji árini, hon fór at fáa. Tí helt hann, at tað var óneyðugt at brúka pening og orku til eitt so umfatandi arbeiði, sum Jógvan Arge skeyt upp.

Hinvegin helt Jógvan Arge, at tað var ikki nóg mikið, at umsitingin bara varð sett at at savna tað saman, sum hon longu visti frammanundan. Hann helt, at tað var neyðugt at gera veruligar, vísindaligar kanningar.

Hesum tók allur minnilutin undir við, tí tey vóru sannførd um, at oljuvinnan fór at fáa ógvuliga stóra ávirkan á Havnina sum høvuðsstað.

Borgarstjórin, Jan Christiansen metti hinvegin, at politikarar vóru komandi og farandi og at tað, sum hevði týdning, var, at umsitingin hevði dyggan kunnleika og tað var hetta, sum uppskotið hjá meirilutanum miðjaði ímóti.

Tá málið so kom til atkvøðugreiðslu, fekk uppskotið hjá minnilutanum fimm atkvøður fyri og átta ímóti og fall sostatt. Síðani varð atkvøtt um tað minni víðgongda uppskotið frá meirilutanum og tað varð samtykt við øllum 13 atkvøðunum í býráðnum.

Sostatt atkvøddi eisini minniluti fyri við teirri áskoðan, at eitt sindur var betri enn onki.




# Legacy of Leadership

## Sovereign Explorer:

The Atlantic Frontier Driller



When the *Sovereign Explorer* began constructing the first exploration well ever off the Faroe Islands in July it was not the first time that the harsh-environment, deepwater rig had entered the history books.

In fact, the *"Sovex"* became the first unit in the world to drill in more than 1,500 feet (500 meters) of water in a harsh environment and the first to drill year-round west of Shetlands. The rig's crews achieved both milestones during BP's 1994/1995 campaign in the area.

With its ability to moor in deepwater harsh-environment locations, the GVA 4000-designed rig can work in water depths up to 4,500 feet (1,372 meters) in harsh environments and 5,500 feet (1,677 meters) in milder conditions.

And work it has. The *Sovex* has constructed more exploratory wells than any other rig in the Atlantic Frontier since 1984. Of the 116 exploration wells spudded there, the *Sovex* has drilled 17, or almost 15% of the total, earning the title The Atlantic Frontier Driller.

What's more, the *Sovex* has drilled the most exploratory wells in greater than 2,000 feet (610 meters) of water in the Atlantic Frontier during the same time period. The rig has drilled 10 of 28 deepwater exploration wells in the region, reigning as the undisputed deepwater-drilling leader.

Built in 1984, the *Sovex* had its share of break-in challenges while working in the UK and the Gulf of Mexico. But subsequent upgrades, employee teamwork and professional care catapulted it into the upper ranks of harsh-environment offshore drilling units.

Now, 45,000 Faroese have turned their eyes to the *Sovereign Explorer*, which having drilled the dry-hole Longan well for Statoil, moved nearby to construct an exploratory well for Amerada Hess in 3,218 feet (981 meters) of water. Fishing is an economic mainstay of the 18-island archipelago, but a commercial hydrocarbon discovery will create new jobs and drive an influx of investment capital.

Whatever the result, watch for The Atlantic Frontier Driller to stay its steady path of harsh-environment, deepwater drilling leadership, just as it has for more than a decade.